# Semjusøkjandi loysn

**Eftirlønin og loyniliga skattauppskotið hjá Sambandsflokkinum eru koyrd í ein pott í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Avtalan um styrktan samhaldsfasta og skattalætta er eitt dømi um eina semjusøkjandi loysn millum flokkarnar í samgonguni, hóast hesir eru hugsjónarliga rættiliga ymiskir á máli**

SAMGONGUSKJAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Okkurt eru vit øgiliga glaðir fyri. Okkurt eru glaðir fyri og til sumt siga vit ja tað gongur nokk. Á tíðindafundinum leygardagin duldi formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, ikki fyri, at fyri at fáa ABC-samgonguna undir land, hevði Javnaðarflokkurin verið noyddur at geva seg í einstøkum málum.

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava givið samgonguskjalinum heitið tann Breiða semjan.

ABC-samgongan ætlar komandi samgonguskeið at arbeiða miðvíst fyri einum breiðum og semjusøkjandi politikki. Hetta verður eisini neyðugt, tí Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin eru hugsjónarliga rættiliga ymiskir og skal tað verða samgonguni lív lagað, verður neyðugt við semjusøkjandi politikki.

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava lagt fyri við at samantvinna skattalætta og eftirlønarviðurskiftini. Her er talan um eina semju millum hugsjónarliga ymiskar flokkar. Bæði Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin kunnu báðir taka undir við skattalættanum, meðan Javnaðarflokkurin hevur telvað seg til ein styrktan samhaldsfasta.

– Hetta er telving aftur og fram. Sambandið og Fólkaflokkurin ynskja ein skattalætta, meðan vit vildu hava eina sterkari eftirlønarskipan. Avtalan um eftirløn og skattaskipan varð tí samantvinnað, sigur Jóannes Eidesgaard

### Loyniliga gjørt alment

Loyndardómurin hjá Sambandsflokkinum er ikki loyniligur longur. Skattauppskotið ella skattareformurin hjá Sambandsflokkinum er partur av samgonguskjalinum hjá ABC-samgonguni. Ætlanin er frá 1. januar 2005 at hækka sonevnda botnfrádráttin úr 22.000 krónum til 30.000 yvir fýra ár.

Føroyski landsskattastigin skal eisini broytast. Vinnur tú yvir 170.000 krónur í dag, sigur landsskattastigin, at tú verður toppskattaður. Komandi fýra árini verður toppskattastigin fluttur frá 170.000 til 300.000 krónur. Hesi átøk fara eisini at lækka landsskattin niður á 21%.

Er tað ikki váðið at fremja ein skattalætta nú niðurgongd er at hóma í føroyska búskapinum?

Jú tað krevur dirvi at fremja ein skattalætta í ringum tíðum. Undanfarna samgonga framdi ein skattalætta fyri 300 mio. krónur, men reelt er skatturin øktur við 3% orsaka av lønarhækkingum. Tá lønirnar hækka, verður lønin, eftir galdandi skattastiga, væl hægri skatta. Fyri at loysa tann trupulleikan verður skattastigin broyttur, so meir liggur eftir hjá vanliga lønmóttakaranum, sigur Jóannes Eidesgaard

### Samhaldsfastið styrkjast

Formaður Javnaðarfloksins dylir ikki fyri, at fyri Javnaðarflokkin hevur eftirlønin nógv størri áhuga enn skattalættin. Føroysku eftirlønarviðurskiftini eru í dag skipaði í trimum súlum. Umframt Fólkapensjón og privata uppsparing, er eisini ein samhaldsføst eftirlønarskipan.

ABC-samgongan hevur sett sær fyri at styrka samhaldsføstu eftirlønarskipanina. Inngjaldið skal hækka við einum prosenti frá bæði lønmóttakara og arbeiðsgevara. Í dag rinda lønmóttakari og arbeiðsgevari hálvt prosent í part og í framtíðini verður hetta gjald hálvtannað prosent.

Við einum styrkum samhaldsfasta hækkar útgjaldið frá 7000 krónum til einar 9.000-10.000 krónum.

– Við nýggju skipanini lofta vit teimum, sum ikki klára seg, meðan fríheitin til at byggja sjálvi víðari gjøgnum samráðingar við fakfeløgini verður varðveitt. Tað er ógvuliga týdningarmikið fyri okkum, at vit geva føroysku pensjónistunum eitt munagott fundament, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.



*– Hetta er telving aftur og fram. Sambandið og Fólkaflokkurin ynskja ein skattalætta, meðan vit vildu hava eina sterkari eftirlønarskipan. Avtalan um eftirløn og skattaskipan varð tí samantvinnað, sigur Jóannes Eidesgaard*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Seks boð upp á fimm ráðharrar

**Jógvan á Lakjuni, Jógvan við Keldu, Jacob Vestergaard og Bjarni Djurholm eru boð upp á teir fýra landsstýrismenninar hjá Fólkaflokkinum, meðan Bárður Nielsen og Alfred Olsen eru sannlíku landsstýrismenn Sambandsfloksins**

LANDSSTÝRIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*





*Boð upp á landsstyrismenn: Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, Jógvan við Keldu, vinnu- ella innlendisráðharri, Jacob Vestergaard, innlendismálaráðharri, Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, Báður Nielsen, fíggjarmálaráðharri og Alfred Olsen, fiskimálaráðharri. Ein av teimum fýra fólkafloksmonnunum má lúta…*

Tað verða helst sjey menn, sum fara at manna nýggja landsstýrið. Tað einasta, sum í skrivandi løtu er heilt vist, er at Jóannes Eidesgaard verður løgmaður og at Hans Pauli Strøm verður landsstýrismaður í heilsu- og almannamálum.

Fólkaflokkurin situr í skrivandi løtu (kl 12 mánadag) á fundi og viðger, hvør skal umboða flokkin í landsstýrinum, og Sambandsflokkurin fer á fund kl 13.

Sosialurin skilir, at tað eru fýra persónar, sum eru upp á tal sum landsstýrismenn fyri Fólkaflokkin.

Tryggasta boðið upp á landsstýrismann í mentamálum er Jógvan á Lakjuni úr Fuglafirði. Hann hevur verið formaður í mentamálanevndini hjá Løgtinginum og hevur umboðað flokkin á tingi síðani valið í 1998 umframt at hann eisini fleiri ferðir áðrenn tað hevur havt sæti sum eykamaður, seinast fyri Kjartan I. Joensen í Leirvík, sum var tingmaður frá 1994-98.

Jógvan á Lakjuni fekk á valinum 20. januar 409 persónligar atkvøður, og fer hann í landsstýrið, kemur Kjartan I. Joensen í Leirvík á ting fyri hann. Hann fekk 155 persónligar atkvøður.

Onnur boð upp á landsstýrismenn hjá Fólkaflokkinum eru Jógvan við Keldu, sum sigst hava hug á vinnumálum. Hann kann tó eisini verða eitt boð upp á nýggjan innlendismálaráðharra, tí hann hevur 16 ára royndir sum borgarstjóri í Klaksvík og hevur verið kommunalpolitikari í eitt mannaminni. Eitt annað boð hjá Fólkaflokkinum upp á innlendismálaráðharra er Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, sum hevur verið formaður í Føroya Kommunufelag.

Fellir valið á Jógvan við Keldu, so kemur Jákup Mikkelsen á ting fyri hann. Jógvan við Keldu hevði 198 persónligar atkvøður, meðan Jákup Mikkelsen fekk 194.

Bjarni Djurholm, sum er landsstýrismaður í vinnumálum, eru sjálvsagt eisini eitt boð. Tað er hugsandi, at hann fer at halda fram í hesum sessi. Men keldur vilja verða við, at hann umhugsar at fara úr landsstýrinum fyri aftur at gerast tingmaður. Tað hevur eisini verið opið stríð millum hann og Poul Michelsen, sum kemur á ting, um Bjarni Djurholm fer í landsstýrið – og kann hann á tann hátt halda Poul Michelsen burtur frá politiskari ávirkan. Bjarni Djurholm fekk á valinum 20. januar 595 persónligar atkvøður. Poul Michelsen fekk 335.

Bárður Nielsen í Vestmanna sigst verða eitt vist boð upp á nýggjan fíggjarmálaráðharra – hann sigst hava fulla uppbakking í Sambandsflokkinum.

Tað sigst eisini vera rættiliga sannlíkt, at Alfred Olsen á Toftum verður nýggjur fiskimálaráðharri. Men norðoyingar hava lagt stórt trýst á fyri at fáa Bjørn Kalsø á Syðradali til fiskimálaráðharra. Norðoyingar hava bæði á fundi í Klaksvík og á fundi hjá Sambandsflokkinum í Havn leygardagin og í skrivi til leiðsluna í Sambandsflokkinum gjørt vart við sítt krav.

Flokkurin hevur nærum trífaldað atkvøðutalið í norðoyggjum síðani 1998 – og hetta var einasta valdømi, har flokkurin hevði framgongd. Norðoyingar hava ikki víst á Magna Laksáfoss, sum fleiri ferðir hevur verið nevndur sum eitt boð.

Sambandsflokkurin hevur verið sera illa umboðaður í Norðoyggjum. Seinastu 50 árini hevur flokkurin bara verið umboðaður á tingi í seks ár, frá 1978 til 1984, tá Eli Nolsøe, sum var landsstýrismaður frá 1970-74, varð valdur á ting. Tá hevði Sambandsflokkurin eitt sera gott val – ikki minst orsakað av sera góða valúrslitinum hjá Paula Ellefsen. Næstsíðsti tingmaður Sambandsfloksin var Óli í Skúla, sum seinast varð valdur í 1950.

Aðrir sambandsmenn eru eisini upp á tal, eitt nú Johan Dahl, Kaj Leo Johannesen og Sune Jacobsen.

Fer Alfred Olsen í landsstýrið, so kemur Frithleif Olsen á ting, hann fekk 366 persónligar atkvøður, meðan Alfred Olsen og Edmund Joensen fingu ávikavist 393 og 383 atkvøður, so har er sera tøtt kapping – og Frithleif Olsen kann lættliga hótta hinar báðar, um hann fær fótin fyri seg á tingi.

Fer Bárður Nielsen á ting, so kemur Olav Enomoto á ting. Bárður Nielsen fekk 357 persónligar atkvøður, meðan Olav Enomoto fekk 78.

# Ein tunn suppa

**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, heldur, at samgonguskjalið hjá Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum kann sammetast við eina tunna suppu. Hann nevnir samgonguna fyri eina sambandssamgongu**

SAMGONGUSKJAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, var staddur á tíðindafundinum í løgtinginum seinnapartin leygardagin, tá samgonguskjalið varð undirskrivað.

– Samgonguskjalið er ein herskin biti at svølgja, tí fyri fyrstu ferð nakrantíð, verða Føroyar og Danmark verða nevnd sum ein ríkiseind. Tað harmar meg, at sambandskreftirnar í Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum vunnu á sjálvsstýriskreftunum, sigur ein harmur Høgni Hoydal.

Hann metir samgonguskjalið sum ein tunna suppu við einari rúgvu av leysum orðingum.

– Samgonguskjalið er ein tunn suppa. Tey málini, sum ætlanin er at yvirtaka eru øll í stoypiskeiðini og tí er eingin sum helst framburður á sjálvstýriskós. Nógvar ætlanir eru á sosiala økinum í samgonguskjalinum, men einki boð upp á, hvussu tær skulu fíggjast, vísir Høgni Hoydal á.

### Anfinn skelkar

Høgni Hoydal sigur seg vera skelkaðan av Anfinni Kallsberg. Hann sigur, at fyri bert seks árum síðan greiddi Anfinn Kallsberg, á líknandi tíðindafundi, frá sínum ætlaninum um at gera Føroyar til eitt fullveldi.

– Anfinn er í dag partur av eini danskari fullveldissamgongu. Eg kann bara ímynda mær, hvat sjálvstýrissinnaðu fólkafloksmenninir sum Torstein Petersen og Poul Petersen høvdu sagt um Fólkaflokkin í dag, sigur Høgni Hoydal.

# Hans Pauli Strøm landsstýrismaður

**Javnaðarflokkurin skjýtur Hans Paula Strøm upp sum landsstýrismann í almanna- og heilsumálum**

LANDSSTÝRISMAÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin hevur sum einasti samgonguflokkurin gjørt tilmælið um landsstýrismenn. Flokkurin skjýtur upp Jóannes Eidesgaard sum løgmann og Hans Paula Strøm sum landsstýrismann í almanna- og heilsumálum fyri Javnaðarflokkin.

Hóast bæði Andrias Petersen og Kristian Magnussen eru fyrrverandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum, fall valið kortini á Hans Paula Strøm. Hans Pauli Strøm var uppstillaður fyri Javnaðarflokkin í Norðstreymi, men Javnaðarflokkurin gjørdist ov stuttur til ein tingsess.

Hans Pauli Strøm er 56 ára gamal. Hann er ættaður úr Vági, men býr í Vestmanna. Hann hevur útbúgving sum hagfrøðingur og starvast á Hagstovu Føroya.

Hans Pauli Strøm umboðaði Javnaðarflokkin á tingi 1998-2002 fyri Norðstreymoyar valdømi.

